## Steypakappingar í fimleiki

Føroya Fimleikasamband skipar aftur í ár fyri steypakappingum í amboðsfimleiki. Kappingarnar verða tríggjar í tali og skipaðar soleiðis, at kappast verður í ymiskum amboðum undir hvørjari kapping. Fyrsta kappingin verður tann 9. februar í Glyvra skúla. Amboðini ið kappast verður í er, forskotin barr og ringar. Næsta kappingin verður á Stórheyggi í Havn tann 16. februar, har kappast verður í bita & lop og paralell barr. Triðja og síðsta kappingin verður so tann 23. februar, eisini á Stórheyggji í Havn. Tá verður bert kappast á gólvi.



## Bussar og upphiting

StÍF skipar fyri bæði bussferð og upphiting. Í tíðindaskrivi, sum er sent miðlunum, verður boðað frá, at bussar koyra frá Eik Banka á Strondum, og steðga hesir eisini við PE á Skála. Sjálv upphitingin verður í bowlinghøllini í Havn, har ókeypis andlitsmáling og onnur fjepparaátøk eru á skránni. Meira kann lesast um átaki ðá heimasíðuni hjá StÍF, www.stif.fo.

# ÍF kann vinna seg aftur

**Talan verður um spennandi oddadyst, tá ÍF sunnudagin tekur ímóti SÍ**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tey fýra mansliðini skulu øll í dystin um vikuskiftið. Mjølnir, sum liggur væl fyri, skal í Havn spæla móti Fleyr leygardagin, og tað er ein dystur, sum Mjølnir skal vinna, um teir vilja liggja við heilt frammi.

Tað er tó ikki bara sum at siga tað. Hóast Fleyr helst er dragnað ov langt aftur, so hevur liðið, síðani tað varð styrkt við spælarum úr Fram, prógvað, at teir kunnu spæla øllum eitt puss, og tað ætla teir ivaleyst eisini í dystinum móti Mjølni.

Sunnudagin verður so oddabrak á Kambsdali, tá SÍ vitjar hjá ÍF. Hevur Mjølnir tá vunnið sín dyst í Havn, so bendir alt á, at teir skulu kappast um FM-heitið við vinnaran av dystinum á Kambsdali.



*ÍF hava møguleika at vinna seg heilt uppí oddin á bestu mansdeildini í flogbólti um vikuskiftið, men tað verður ikki ein lættur dystur, tí SÍ stendur hinumeðna netið. Seinast liðini møttust var í Sørvági, og tá vann SÍ ein fimm-settara 3-2*

### SÍ í síðulinjuni

Hjá kvinnum verður oddaliðið bókstaviliga á síðulinjuni um vikuskiftið.

SÍ er nevnliga dómari í øllum teimum trimum dystunum, sum verða spældir hetta vikuskiftið.

Her veður stóri spenningurin helst, um ÍF megnar at taka stigini við sær, tá tær vitja í Trongisvági hjá TB. Ein dystur, sum kann lyfta ÍF heilt nær SÍ. Aðra staðni vitjar Dráttur hjá Fleyr, meðan Mjølnir á heimavølli tekur móti KÍF.

### FAKTA

**Dystir um vikuskiftið**

**Hondbóltur**
Coca Cola kappingin
**Kvinnur**

| Dagur | Klokkan | Dystur |
|---|---|---|
| 09.02 | 13.30 | Stjørnan-Kyndil |
| **Menn** | | |
| 09.02 | 16.00 | StÍF-Kyndil |

**Flogbóltur**
**Meistaradeild kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 09.02 | 14.00 | Fleyr-Dráttur |
| 10.02 | 14.00 | Mjølnir-KÍF |
| 10.02 | 15.00 | TB-ÍF |

**Meistaradeild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 09.02 | 16.00 | Fleyr-Mjølnir |
| 10.02 | 18.00 | ÍF-SÍ |

**Meistaradeild menn**

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | sett-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 9 | 6 | - | 3 | 24 | 16 | 8 | 7 |
| 2 Mjølnir | 8 | 5 | - | 3 | 18 | 12 | 6 | 7 |
| 3 ÍF | 8 | 5 | - | 3 | 19 | 16 | 3 | 6 |
| 4 Fleyr | 9 | 1 | - | 8 | 9 | 26 | -17 | 2 |
| | | | | | | | | |
| 7 Fleyr | 14 | 0 | - | 14 | 5 | 42 | -37 | 0 |

**Meistaradeild menn**

| | | | | | vunnin | tapt | sett- | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|

**Meistaradeild kvinnur**

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | sett munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 14 | 13 | - | 1 | 41 | 10 | 31 | 15 |
| 2 ÍF | 13 | 11 | - | 2 | 35 | 13 | 22 | 12 |
| 3 Dráttur | 14 | 9 | - | 5 | 32 | 23 | 9 | 10 |
| 4 KÍF | 13 | 6 | - | 7 | 25 | 23 | 2 | 7 |
| 5 Mjølnir | 14 | 5 | - | 9 | 21 | 32 | -11 | 5 |
| 6 TB | 14 | 4 | - | 10 | 17 | 33 | -16 | 5 |
| 7 Fleyr | 14 | 0 | - | 14 | 5 | 42 | -37 | 0 |

**Meistaradeild menn**

| | | | | | vunnin | tapt | sett- | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|


Tøkk fyri stuðulin á løgtingsvalinum

Eg vil fegin takka øllum teimum, sum lótu Sambandsflokkinum sína atkvøðu og eina persónlig tøkk til tykkum 979 sum atkvøddu fyri mær.

Valið kendist fyri meg sum ein álitisváttan, ið gevur mót uppá, at halda áfram á tí politisku kós eg havi roynt at lagt.

Ein serlig tøkk til tykkum, sum á ymiskan hátt hjálptu til við valstríðnum.

Magni Laksáfoss

